# Skráin fyri Sjómannadagin 2005

**Leygardagin verður Sjómannadagurin hildin í Klaksvík.**



| | |
|---|---|
| Kl. 09.00 | Frásøgumaðurin, Karl Birgir Isaksen bjóðar vælkomin |
| Kl. 09.05 | Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í Fiskivinnu málum setur Føroya Sjómannadag 2005 |
| Kl. 09.10 | Norðoya Sparikassi bjóðar til stórt morgunmatarborð |
| Kl. 09.10 | Framsýningar og sølubúðir lata upp |
| Kl. 09.45 | Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri avdúkar standmynd, sum Archibal Black og Ólavur Samson hava gjørt. |
| Kl. 10.00 | Nýggi bjargingarbáturin "Ziska" hjá Norðoya Bjargingarfelag kemur inn eftir Vánni og leggur at á stongunum. Sjóverjuskipini Triton og Tjaldrið fylgja bátinum til bryggju. Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa, heldur røðu. |
| Kl. 10.30 | Svimjikapping um Vánna, Klaksvíkar Froskmannafelag skipar fyri. |
| Kl. 11.00 | Hoppikapping á boyum, Sjómanskvinnuringurin í Norðoyggjum skipar fyri. |
| Kl. 11.30 | Heimsmeistarakapping í togtogan millum skipsmanningar. |
| Kl. 12.00 | Fólkalívsmyndir. Biskupstøðbáturin drigin eftir bryggjuni og flótaður við verjuleguna. Síðani setur manningin línu uttan fyri Stangabrúgvarnar |
| Kl. 12.30 | Kapprógving millum bátar í Norðoyggjum 5 mannafør, 6 mannafør og 10 mannafør við old boys. |
| Kl. 13.30 | Bjargingarroynd, Norðoya Bjargingarfelag skipar fyri. |
| Kl. 14.00 | Heimsmeistarakapping í trolbøting, Vónin skipar fyri. |
| Kl. 14.30 | Heimsmeistarakapping at skera agn |
| Kl. 15.00 | Føroyameistarkapping í egning og Heimsmeistarakapping í egning. Føroyameistarin kemur at kappast um heimsmeistaraheitið móti íslendska og norska meistaranum. |
| Kl. 17.00 | Heimsmeistarakapping í stafettrenning við stampum |
| Kl. 18.00 | Heimsmeistarakapping í sjómanstaki |
| Kl. 18.30 | Heimsmeistarakapping Kasta lodd |
| Kl. 19.00 | Heimsmeistarakapping Halda dregg |
| Kl. 19.30 | Heimsmeistarakapping í Kelving |
| Kl. 20.00 | Steypahandan til bestu bátar og skip í Norðoyggjum |
| Kl. 22.00 | Bryggjudansur. Byrjað verður við Føroyskum dansi, sum Klaksvíkar Dansifelag skipar fyri. Síðani spæla Jákup Marnar Antoniussen og Heini Ziska Dahl saman við harmonikumonnum til dans. |




## VIÐMERKINGAR

# Svar til diplomat í Miðvági



**Gerhard Lognberg**
*Borgarstjóri og løgtingsmaður*

Eg má bara harmast um so negativa skriving. Hvørja uppgávu er litið tær upp í hendi, Napolium Magnussen, borgarstjóri í Miðvági, er tað ikki at verða borgarstjóri í Miðvági? Tað kann tykjast, sum tú er ein sannur serfrøðingur í kommunumálum!

Eg vóni at Sandoy fer at klára seg uttan títt briksl.

Kloakkina frá Sandoyar Meginskúla skulu vit nokk klára, og má eg heilt erliga siga, at nakran klandur um hana, veit eg einki um. Allar kommunurnar í Sandoy hava umboð í skúlasambandinum.

### Skopun og Tórshavnar Kommuna

Napolium Magnussen heitur á løgmann um at seta sirkul um Sandoy, áðrenn Gerhard endar í Tórshavnar Kommunu.

Skal tú í Sandoy at siga, hvat ið vit skulu gera, ella ert tú so glaður um, at sjálvræði verður tikið frá kommununum.

Eg eri valdur her á staðnum í gjøgnum 21 ár, og fari eg at taka so tíðandi mál sum hetta upp við kommunustýrið og fólki her á staðnum.

Vit klára okkum, og vilja vit heldur enn fegin samstarva við hinar bygdirnar í oynni. Um vit meta, at rætt er at leggja saman við Tórshavnar Kommunu, so verður tað okkara sak og ikki tín! Tað tykir mær, sum tú hevur latið teg velja til borgarstjóra við einum fyri eyga, og tað er at avreiða tína kommunu Miðvág.

### Tórshavn og Kollafjørður sundur

Her tykist mær sum um Napolium ikki er so glaður fyri samanlegging, og tekur so hjartaliga synd í kollfirðingum. Jú, her kemur tað, tær stóru kommunurnar eta tær smáu.

Annars skal eg ikki blanda meg í hvussu kollfirðingar og Tórshavnar Kommuna avgreiða sínar uppgávur. Eg havi nokk við meg sjálvan.

### Tórshavnar Kommuna og útjavning

Eg havi oftani havt tað frammi um útjavning, tí so nógv fellur niður í Tórshavn. Har eru vit samdir.

Síðani endar tú aftur við briksli um at Tórshavnar Kommuna kanska endar sum fyrr, tá teir gingu biddaragongd út á bygd. Ikki serliga diplomatiskt eftir mínari meining.

### Loypa úr stólinum

Nei, tað var hatta briksli, sum tú kryddaði greinina við, sum fekk meg at taka pennin.

Tú sigur, at tað er bara ein vegur, og tað er frameftir.

Sjálvur haldi eg ikki tína kós verða serliga greiða. At briksla og verða negativur um onnur, og krýna seg sjálvan sum serfrøðing, haldi eg ikki verða rætt.

Nær og hvar Skopunar Kommuna leggur saman, skulu vit sjálvi finna útav, uttan at onnur blanda seg í hesa sák.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.